**Dagur:** 23. mai 2001
**Skrátal:** 31201
**Máltal:** 010464/39

# *Heimildir hjá skúlastýrinum sambært galdandi fólkaskúlalóg*

**Sambært § 25**
*Stk. 3.*
- ?? Gevur tilmæli til landsstýrismannin um at víkja frá reglunum í Kap. 2 til at fremja royndarvirksemi og menningararbeiði.

**Sambært § 39**
- ?? Skúlastýrið kann sleppa lærara undan at undirvísa í kristni.

**Sambært § 52**
*Stk 1*
- ?? Eftirlit við virksemi skúlans.
- ?? Tekur avgerð um øll viðurskifti, ið ikki eru løgd undir aðrar myndugleikar.

*Stk. 2:*
- ?? Ummælir árligu fíggjarætlanina
- ?? Leggur øll mál fyri kommunustýrið, sum bera fleiri útreiðslur við sær enn ásett í fíggjarætlanini.

*Stk. 3.*
- ?? Viðger saman við kommunustýrinum skúlabygging/umbygging

*Stk. 4.*
- ?? Ger uppskot um skúlabygnað og broytingar í hesum.

**Sambært § 53**
*Stk. 1* ásetur meginreglur um:
- ?? Undirvísingarætlan skúlans.
- ?? Arbeiðsbýtið millum lærarar og vikuætlanina.
- ?? Samarbeiðið millum heim og skúla.
- ?? Fráboðan til heimini um úrtøku næminganna av undirvísingini.
- ?? Næmingafráverur.
- ?? Foreldrafundir, felagstiltøk fyri næmingar í skúlatíðini, setursskúla, starvspraktikk o. a.

*Stk. 2.*
- ?? Skal ummæla øll mál viðvíkjandi skúlanum, sum kommunustýrið tekur avgerð um.

*Stk. 3.*
- ?? Hevur rætt at ummæla øll mál, ið viðvíkja skúlanum og mál, sum kommunustýrið og landsstýrið leggja fyri tað.

*Stk. 4.*
- ?? Góðkennir undirvísingarmiðlar.

*Stk. 5.*
- ?? Ger ítøkiligar reglur um atferðarreglur og umsjón í skúlanum.


✍ MENTAMÁLASTÝRIÐ • HOYVÍKSVEGUR 72 • POSTRÚM 3279 • FO-110 TÓRSHAVN
✍ (+298) 35 50 50 • ? (+298) 35 50 55 • MMS@MMS.FO

*Stk. 6.*

?? Skal samstarva við onnur skúlastýri í økinum.

**Sambært § 54**

*Stk. 1 og 2.*

?? Gevur landsstýrismanninum tilmæli um setan og uppsøgn av lærarum og leiðarum skúlans.

*Stk. 3.*

?? Setur lærarar í tíðaravmarkað størv og loysir lærarar úr tíðaravmarkaðum størvum.

**Sambært § 62**

*Stk. 1.*

?? Ummælir avvik frá ásetingunum um skipan av undirvísingini fyri næmingar, tá ið foreldur teirra eru limir í trúarsamfeløgum uttan fyri fólkakirkjuna.

**Sambært § 63**

*Stk. 1.*

?? Ummælir nýtslu av skúlans høli til annað endamál enn skúlans undirvísing.

## Viðmerkingar til §§ 52 og 53

**Viðvíkjandi eftirlitinum sbr. § 52:**

Skúlastýrið hevur eftirlit við øllum virksemi skúlans. Tað kann ikki broyta eina ítøkiliga avgerð, sum skúlaleiðarin hevur tikið. Skúlastýrið kann saman við skúlaleiðaranum viðgera øll mál, sum hava týdning fyri virksemið skúlans, og kann krevja allar upplýsingar hesum viðvíkjandi.

Heimildin hevur við sær, at skúlastýrið eftir avtalu við skúlaleiðaran hevur rætt at vera til staðar í øllum undirvísingartímum. Skúlastýrið hevur ikki rætt til at leggja seg beinleiðis út í undirvísingina, men kann biðja um samráð við skúlaleiðaran um ávís undirvísingarlig viðurskifti.

**Viðvíkjandi ásetan av meginreglum sbr. § 53:**

Skúlastýrið skal áseta meginreglur um virksemi skúlans. Stevnumiðini fyri, hvussu skúlaleiðslan umsitir tað námsfrøðiliga og fíggjarliga virksemið, verða sostatt ásett av skúlastýrinum. Skúlastýrið skal halda seg til teir karmar, sum landsstýrismaðurin og kommunurnar hava ásett sambært sínar heimildir, og tey eiga at geva skúlaleiðaranum virkismøguleikar og virða rættin hjá skúlaleiðaranum at taka avgerðir í stakførismálum.